## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin og hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði, seinnapartin minni vindur. Turt og sólglottar og hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin lot av norði og landnyrðingi, turt og sólglottar. Sunnudagin veksur hann vindin upp í ein strúk av eystri og møguliga regn. Hitin millum 11 og 15 stig.

# 1108 roknskapir mangla

**Tað restaðu 1108 roknskapir í, tá freistin at lata ársroknskapin inn til Skráseting Føroya var úti tann 1. juli**

ROKNSKAPIR
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Klokkan gongur nú av álvara hjá teimum, sum enn mangla at lata ársroknskapin inn til Skráseting Føroya.

Tá freistin var úti 1. Juli restaðu heilir 1108 roknskapir í, upplýsir Skráseting Føroya, og er hetta ein vøkstur á góð 5 prosent samanborið við í fjør, tá talið var 1046.

Í dag manglaðu 949 feløg enn at lata ársroknskapin inn, og koma hvønn dag fleiri roknskapir. Men tað eru ikki øll, ið fáa roknskapin inn áðrenn evstamark, og í ár er freistin styttri, enn hon hevur verið.

- Onnur ár hevur tað verið soleiðis, at fyrst er ein rykkjari sendur út, sum varir fýra vikur, og um roknskapurin ikki er komin inn tá, varð ein annar rykkjari sendur út, sum vardi í 14 dagar.

Var roknskapurin tá ikki komin inn, varð felagið sent Skiftirættinum til tvingsilsavtøku, greiðir Kristina Ottosdóttir av Skráseting Føroya frá.

### Styttri freist í ár

Soleiðis er tó ikki í ár. Í ár er freistin styttri, og verður bert tann eini rykkjarin sendur út, sum er galdandi í fýra vikur.

- Er roknskapurin tá ikki komin inn, verður felagið sent Skiftirættinum uttan aðra ávaring, greiðir Kristina Ottosdóttir frá.

### Borðið fangar

Er felagið fyrst sent Skiftirættinum, ber tó til at fáa tað út aftur, um ein kann vísa á ein góðkendan roknskap innan rímiliga tíð. Tó fangar borðið, og hevur felagið fyrst verið í Skiftirættinum, ber ikki til at fáa tað út aftur, um tað endar sama stað aftur innan fimm ár.

Í fjør vórðu 43 feløg send Skiftirættinum til tvingsilsavtøku, og í ár vænta tey at talið verður nakað størri.



*Í fjør fóru 43 feløg undir hamaran, tá tey ikki kláraðu at lata ársroknskapin inn. Í ár vænta tey á Skráseting Føroya at talið verður upp aftur størri*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 18 |
| Aberdeen | 21 |
| London | 22 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 15 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 11 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 31 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 29 |
| Athen | -- |
| Malta | 33 |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 15 |
| New York | 25 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 01 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1024 hPa. eystan fyri Grønland fer í útsynning. Eitt lágtrýst, 998 hPa. yvir Suður-Noreg stendur mestsum í stað og dýpist nakað.

**Komandi nátt:**
Hátrýstið yvir Íslandi stendur mestsum í stað, so køld luft av landnyrðingi og norði streymar framvegis móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 05/07 kl. $06^{00}$ – 06/07 $06^{00}$. Hitin í gjár: 10,9°
Minsti hiti máldur í juli: +0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 05/07 kl. $06^{00}$ – 07/07 $06^{00}$.
Avfallið higartil í juli: 2 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

7. juli — Fullmáni/ Mánin longst frá jørini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. juli | 07:39 | 20:00 | 06:39 | 19:00 | 06:54 | 19:15 | 09:39 | 22:00 | 10:39 | 23:00 | 05:54 | 18:15 | 04:54 | 17:15 | 07:54 | 20:15 | 08:54 | 21:15 | 07:24 | 19:45 | 08:39 | 21:00 |
| 8. juli | 08:21 | 20:41 | 07:21 | 19:41 | 07:36 | 19:56 | 10:21 | 22:41 | 11:21 | 23:41 | 06:36 | 18:56 | 05:36 | 17:56 | 08:36 | 20:56 | 09:36 | 21:56 | 08:06 | 20:26 | 09:21 | 21:41 |
| 9. juli | 09:01 | 21:19 | 08:01 | 20:19 | 08:16 | 20:34 | 11:01 | 23:19 | - | 12:01 | 07:16 | 19:34 | 06:16 | 18:34 | 09:16 | 21:34 | 10:16 | 22:34 | 08:46 | 21:04 | 10:01 | 22:19 |
| 10. juli | 09:38 | 21:56 | 08:38 | 20:56 | 08:53 | 21:11 | 11:38 | 23:56 | 00:19 | 12:38 | 07:53 | 20:11 | 06:53 | 19:11 | 09:53 | 22:11 | 10:53 | 23:11 | 09:23 | 21:41 | 10:38 | 22:56 |
| 11. juli | 10:15 | 22:33 | 09:15 | 21:33 | 09:30 | 21:48 | - | 12:15 | 00:56 | 13:15 | 08:30 | 20:48 | 07:30 | 19:48 | 10:30 | 22:48 | 11:30 | 23:48 | 10:00 | 22:18 | 11:15 | 23:33 |